## Handtøkur í Meksiko

Í Meksiko søktu umleið 200 løgreglumenn við hernaðarakførum at tilhaldsstøðum hjá tí illa gitna rúsevnaharkaliðnum La Familia Michoacana sunnudagin. Minst 34 fólk vórðu tikin. Fleiri teirra vórðu tikin, tá løgreglan fór inni í eina kirkju mitt undir guðstænastuni, og tað hevur fingið ta katólsku kirkjuna at finnast at løgregluni, skrivar AP. Løgreglan legði eisini hald á 11 marglætisbilar, nøkur tung vápn og fleiri túsund krónur. Millum tey tiknu var Miguel Angel Beraza Villa, sum verður hildin at hava verið ein av høvuðsmonnunum aftan fyri rúsevnasmuglingina úr Meksiko til USA.



## Sendur til rættarsókn

Tann 75 ára gamli Karheinz Schreiber kom í morgun til Týsklands við flogfari úr Kanada, eftir at kanadisku myndugleikarnir valdu at gera eftir einari áheitan frá týsku myndugleikunum um at fáa mannin útflýggjaðan. Týska ákæruvaldið krevur, at Karlheinz Schreiber skal hava minst 15 ára fongsul fyri at hansara lut í korrupsjónsmálinum, sum kostaði Helmuth Kohl kanslaraembætið í 2002. Umframt korrupsjón er Karlheinz Schreiber skuldsettur fyri mutur og skattasvik.

# íð ein dreymur



*Jógvan er sera fyrikomandi maður og lítillátin, og stillar fegin upp til myndatøku saman við fjepparunum*

hvussu tað spældi av, og Jógvan sigur, at hansara karriera sum sangari fyribils »peak'aði« við sigrinum í X-Factor.

Tað er ein kend søk, at nógvir vinnarar av slíkum kappingum blomstra upp eina stutta tíð, fyri síðani heilt av hvørva av tónleikapallinum. Men har heldur Jógvan Hansen, at hansara royndir framman undan í Føroyum við Aria og Kulum Rótum, hava hjálpt honum sera væl.

- Tað ræður um at duga at brúka resursirnar, og tað hevur tíðin við tónleikinum í Føroyum lært meg, sigur Jógvan Hansen.

Tað er eisini tí, at »populariteturin« hjá Jógvani hevur hingið við í Íslandi, eisini nú fleiri ár eftir, at hann vann íslendsku X-Factor kappingina.

### Hørð kapping

Jógvan Hansen hevur í løtuni tvey arbeiði. Annað er sum tónleikari og hitt sum frisør.

- Eg kundi gott liva av at verið tónleikari burtur av, men mær dámar væl tað trygga við frisørstarvinum. Har hevur tú eina fasta inntøku, meðan tað við tónleikinum kann verða upp og niður, sigur Jógvan Hansen.

Hann átti sjálvur salongina í Reykjavík, men gjørdi so av at selja hana.

- Tað var í tøkum tíma áðrenn kreppan rakti. Eg seldi í fjør, so nú starvist eg sum vanligur frisør hjá nýggja eigaranum, sigur Jógvan Hansen.

Orsøkin til, at hann gjørdi av at selja var, at hann vildi raðfesta tónleikin hægri. Og tað hevur hann tað gott við í dag.

- Fólk, sum kenna meg, siga, at eg síggi nógv glaðari út nú, enn tá eg átti frisørsalongina. So tað hevur ávirkað meg positivt, at tónleikurin er komin inn í lívið aftur, sigur Jógvan Hansen.

Hann viðurkennir, at tað er ein hørð kapping innan tónleikaverðina í Íslandi.

- Tað finnast so nógvir ótrúliga nógvir góðir bólkar og einstaklingar í Íslandi, og tað er hart at standa seg, sigur Jógvan Hansen.

Hann viðgongur tó, at tað hjálpir væl um, at hann er so kendur í Íslandi, sum hann er.

- Ikki tað, at vinna X-Factor hevur gjørt, at eg automatiskt verði biðin at spæla, men tá eg ringi runt til spælistøðini kenna fólk meg, og eg sleppi undan at greiða frá hvat og hvussu. Og tað er ein fyrimunur, og tað hjálpir kanska eisini til, at eg fái uppgávur, sigur Jógvan Hansen.

### Gjøgnumbrotið

Íslendingar hava eina megastjørnu innan tónleik, nevniliga Bjørk. Hvat tað so var, sum skapti hennara gjøgnumbrot, so lúrir Jógvan Hansen eftir sama møguleika.

- Allir tónleikarar droyma um tað stóra gjøgnumbrotið. Men tað ræður um at raka røttu tíð og rætta stað, sigur Jógvan Hansen.

Hann staðfestir, at tað ikki altíð eru evnini og dugnaskapurin, sum eru avgerandi fyri, um ein tónleikari fær altjóða gjøgnumbrot.

- Tað er ofta tilvildin, sum ræður. Men er tú á rætta stað til røttu tíð, og alt annars lagar seg fyri teg, so kann tað heilt stóra gott henda, sigur Jógvan Hansen.

Hann heldur kortini, at tað týdningarmesta er, at leggja hjarta og sál í tónleikin, tí tá kemur tað besta burtur úr.

So meðan klaksvíkingurin framvegis vónar, at lagnan skal laga tað soleiðis, at hann fær sítt altjóða gjøgnumbrot, fæst hann fyribils við at umseta føroyskar sangir til íslandskt, og íslendskar sangir til føroyskt.

- Hetta er ein verkætlan, ið skal enda við einari fløguútgávu. Eg havi fingist við hetta eina tíð, men enn er ov tíðliga at seta dato á, nær útgávan verður veruleiki, sigur Jógvan Hansen.

Tað eru annars ikki meiri enn tríggjar vikur, síðani hann lat eina single útgávu úr hondum, nevnd »Do You Believe«, og tað er fyrsta útgávan síðan tíðina við Aria og Kular Røtur.

Hvat so framtíðin annars fer at bjóða, so er Jógvan Hansen vísur í, at tey fyrstu komandi árini verður hann búgvandi í Íslandi. Og tað er serliga hugaligt hjá føroyingum at búgva í grannatjóðini fyri vestan í hesum døgum.

- Tað kennist væl, at íslendingar eru sera vinarliga sinnaðir mótvegis føroyingum í hesum døgum. Lánið, sum føroyingar lótu Íslandi, hevur sett síni spor eftir seg, og hóast talan bara var um eina symbolska upphædd, so halda íslendingar, at tað er tankin, sum telur. So, sjálvt um tað altíð hevur verið gott at verið føroyingur í Íslandi, so er tað eyka gott í hesum døgum, sigur Jógvan Hansen, áðrenn hann aftur má fara at skriva autografar til ídnar fjeppparar.